# SKF koyrir 2.500 fólk til hús

Svenska fyritøkan SKF, sum er kend um allan heimin fyri sínar kúlulegur, boðaði fyrradagin frá, at hon hevur sagt 2.500 av sínum medarbeiðarum úr starvi. Grundgevingin er víknaður marknaður, sum serliga kemst av, at bilaídnaðurin hevur skrúvað blussið nógv niður. SKF, sum er meiri enn 100 ára gomul fyritøka, hevur deildir í nógvum londum, og tilsamans arbeiða 43.000 fólk hjá fyritøkuni. Tey, sum nú missa arbeiðið, arbeiða í USA, Fraklandi, Italia og í Ukraina.

# Ríkisveitingin samtykt í Fólkatinginum

Bara Edmund Joensen, fólkatingsmaður, tók orðið, tá ríkisveitingin til Føroya varð einmælt samtykt í Fólkatinginum í morgun. Edmund Joensen segði millum annað, at veitingin hevur sjáldan havt so stóran týdning fyri Føroyar sum nú svørt skýggj hanga yvir búskapinum. - Í einari tíð, har undirskotið á føroysku fíggjarlógini kann gerast størri enn 600 milliónir krónur, er ríkisveitingin á 615,5 milliónir krónur sera týðandi. Var ríkisveitingin ikki, hevði holið á fíggjarlógini verið ovurstórt – meira enn 1,2 milliardir krónur, segði Edmund Joensen. Viðgerðin av lógaruppskotinum um ríkisveitingina fyri 2009 var hin 3. og seinasta. Fólkatingið samtyktið uppskotið einmælt við 110 atkvøðunum fyri, ongari ímóti og ongari blankari atkvøðu.



*- Eg haldi, at stemningurin í býráðnum at fara undir hesi komandi fýra árini er góður, og tað er við góðum treysti, at eg nú taki við borgarstjórasessinum, sigur Gunvá við Keldu*

kendi eg á mær, at eg antin mátti hanga í og onga ávirkan hava – ella at eg trekti meg, tí eg ikki kundi standa “modell” til tað, sum fór fram.

- Tað eru fleiri kommunur, sum skylda eina álíkning, og tí kunnu vit í dag siga, at okkara kommuna uppundir valið kom í størri “fokus”, enn grundarlag var fyri.

## Órættvís viðgerð

Gunvá sigur, at seinastu 10 árini eru inntøkurnar hjá Klaksvíkar kommunu tvífaldaðar.

- Stýringin á útreiðslusíðuni hevur ikki verið nóg neyv. Vit hava ikki í nóg stóran mun sett okkum spurningin, hvat vit í veruleikanum hava havt ráð til. Hetta gekk so leingi, sum lánistovnarnir “spældu” við. Tá teir ikki vóru við meira, kom stýgur í.

Komandi borgarstjórin heldur kortini, at kommunan kom í eitt keðiligt ljós uppundir kommuvalið, tí veruleikin er, at lánsskuldin er ein álíkning, ið er tað, sum kommununi er loyvt.

## Í trygga legi

Hon sigur, at seinast í nítiárunum og fyrstu árini eftir av ár 2000 gekk væl at rinda niður á kommunuskuldini, men seinastu 6-8 árini er skuldi aftur bara vaksin.

- Í sínari tíð skyldaði Klaksvíkar kommuna uppí fleiri álíkningar, men soleiðis er ikki í dag. Tí er tað ikki rætt, at kommunan er so illa fyri, sum mong halda. Eg havi átikið mær eina stóra og spennandi uppgávu, og eg fari saman við hinum í býráðnum at gera mítt best fyri, at vit skulu fáa kommuna í eina trygga og skilagóða legu, sigur Gunvá við Keldu.

- Tað vóru nógv ymisk viðurskifti, ið viðvirkaðu til mina avgerð, og ein partur var fíggarliga stýringin av kommununi. Eg føldi, at stýringin ikki var nóg neyv, og tá eg aftur og aftur gjørdi vart við míni sjónarmið, sum slett ikki vórðu hoyrd, tók eg avleiðingarnar av støðuni og trekti meg.

Hon sigur, at hetta var ikki ein avgerð, hon tók yvir eina nátt, men ein væl umhugsað avgerð, sum eg framvegis haldi var røtt.

- Býráðið tók eitt nú avgerð um at leggja 9 miljónir krónur á Viðareiði, sum slett ikki er partur av Klaksvíkar kommunu – og samtykt varð eisini at brúka nógan pening í Svínoy, sum nú kortini verður partur av Klaksvíkarkommunu. Støðan við ætlaðu íløguni í Svínoy er tí eitt sindur øðrísi í dag, leggur hon aftrat.

Gunvá var eisini ímóti ætlanini at leggja fólkaskúlarnar saman og hava eina einstreingjaða leiðslu, sum er í stríð við lógina.

- Trupulleikin var, at míni sjónarmið ikki vórðu hoyrd. Eg eri ikki tann, sum leypir frá orðum og ábyrgd. Soleiðis, sum støðan var,



*Í nýggja býráðnum í Klaksvíkar kommunu eru 11 fólk, harav tey sjey eru nýggj*